# Søgu- og samfelagsdeildin
## Faculty of History and Social Sciences

**Kunning um Bachelor í Samfelagsvísindum á Fróðskaparsetrinum**

- **Hvat eru samfelagsvísindi?**
- **Hvat kann bachelor í samfelagsvísindum brúkast til?**
- **Hvat kann góðskrivast? <u>Sí oyðublað</u>**

**Hvat er tað?**
Søgu- og samfelagsdeildin hevur stovnað nýggja tvørvísindaliga samfelagsliga útbúgving. Ætlanin er, at lesandi skulu kunna seta saman sína egnu dreymaútbúgving innanfyri karmarnar av samfelagsvísindum. Hugtakið samfelagsvísindi fevnir um frøðigreinar, ið lýsa millum annað søgu, stjórn, lóg, mentan, samfelag, politikk, landslag, búskap – umframt ymisk stuðulsfak sum t.d. hagfrøði og telduforrit.

**Hvat brúkast til?**
Tvørvísindalig útbúgving fyrireikar tann lesandi uppá tann fjølbroytta veruleika, ið fer at møta henni ella honum næstu ártíggjuni. Vit bjóða teimum lesandi eina líka so fjølbroytta fyrireiking við denti á háttaløg – at læra at læra um samfelagið, at duga at seta seg inn í og greina torskildan ymiskleika og broytiligan veruleika.

Hevur tú ávíst dreymastarv – t.d. vera lærari á miðnámi ella granskari í eldgosum – so kann Fróðskaparsetrið bjóða tær neyvari útbúgvingar sum bachelor í søgu ella jarðalisfrøði.

Væntar tú at skifta lívsleið við hvørt ella at skula skilja og miðla eitt sindur av hvørjum – sum t.d. tíðindafólk, tingfólk, málsviðgeri, ráðgevi ella vinnulívsfólk – er tvørvísindaliga samfelagsliga útbúgvingin helst akkurát tín fyrireiking.

**Hvat kann góðskrivast?**
Sera mong spyrja, um tey kunnu góðskriva skeið tikin aðrastaðni á bachelor í samfelagsvísindum. Hetta ber væl til! Vit góðskriva fegin tey fak: 1) sum líkjast okkara egnu, 2) sum vit kundu boðið út sjálvi, men ikki megna í løtuni, 3) onnur viðkomandi samfelagsvísindalig fak. Treytirnar eru bert, at tú ikki brúkar fak 'dupult', og at vit vilja hava munandi part av útbúgvingini tiknað her á skúlanum, so tey lesandi gerast 'okkara.' Vit vænta nógv lesandi, sum hava tikið skeið í ymsum samfelagsvísindum serliga uttanlands, at skifta til Fróðskaparseturs og taka tvørfakligan bachelor í samfelagsvísindum.

**Fakini**
Á Søgu- og samfelagsdeildini standa á heysti 2010 hesi fakini í boði:

☐ Grundskeið í lóg ☐ Mentanarfrøði ☐ Føroysk nýtíðarsøga
☐ Samfelagsvísindalig háttaløg ☐ Búskapur og samfelag

Hesi kunnu øll veljast sum partur av bachelor í samfelagsvísindum. Harumframt fara næstu tvey árini ætlandi hesi fakini at standa í boði:

☐ Dátagrundaði háttaløg ☐ Vísindaástøði ☐ Føroyskir politiskir stovnar
☐ Hagfrøði ☐ Altjóða politikkur ☐ Nýtíðar heimssøga
Søguvísindalig háttaløg ☐ Politiskt ástøði ☐ Sociologi

Á triðja ári skulu tey lesandi velja sær nøkur fak at fara í dýpdina við – herundir at skriva ritgerð innan evni, tey hava nomið sær kunnleika til.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | E-postur | Telefon | Fax |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| J. Broncks Gøta 25, 4.h.<br>FO 100 Tórshavn | J. Broncks Gøta 25, 4.h.<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | ssd@setur.fo | 352580 | 352581 |